tíðindablaðið
sosialurin

Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
Fyritaksstjóri: Kristjan Dahl
Ljósmyndari: Kalmar Lindenskov

Blaðfólk: Høgni Djurhuus
Randi Jacobsen
Tórfinn Smith

Útgevari: P/f Sosialurin
Uppseting: P/f Sosialurin
Prent: P/f Pressan 1981

Bústaður: Argjavegur 26
Argir
Telefon: 11820

Postadressa: Postamoga 76
110 Tórshavn
Telefax: 14720

Okkara millum

LEYGARDAGIN fingu vit »Okkara Millum«. Hetta er málgagnið hjá Føroya Fiskasølu.

ODDAGREININA skrivar sjálvur fiskasølustjórin. Ella stjórin á tí almenna koddanum. Hetta navnið hóskar munandi betur. Tí hevur nakar lagt høvdið niður á tann almenna koddan, so er tað Birgir Danielsen og hansara fyritøka.

UNDANFARNA landsstýri fær skuldina fyri allar landsins vanlukkur. Stjórin á tí almenna koddanum undrast yvir at Sosialurin og javnaðarflokkurin hava skuldsett kommunur, SEV, bankarnar, fiskasøluna og tað privata annars fyri fíggjarligan ørskap.

MEN stjórin á tí almenna koddanum átti at vitað betur. Hann átti at vitað, at meðan undanfarna landsstýri sat, varð uttanlandsskuldin hjá landskassanum goldin niður úr umleið 750 mió. kr. í umleið 250 mió. kr. Hann átti eisini at vitað, at teir almennu grunnarnir — Menningargrunnurin, Ídnaðargrunnurin og Húsalánsgrunnurin — ikki øktu uttanlandsskuldina hesi árini. Somuleiðis átti hann at vita, at tað gjørdu teir almennu stovnarnir heldur ikki.

HÓAST hetta, so var uttanlandsskuldin vaksin úr góðum 3 mia. kr. upp í 6,7 mia. kr. Landskassin økti ikki uttanlandsskuldina. Teir almennu grunnarnir øktu heldur ikki uttanlandsskuldina. Og tað gjørdu almennir stovnar heldur ikki. Eftir stendur so, at SEV, ávísar kommunur, bankarnir og tað privata annars hava gjørt tað. Hetta er ikki nakar leysur pástandur. Hetta er ikki tikið úr leysum lofti. Hetta kunnu vit prógva til eina og hvørja tíð.

TAÐ undrar okkum almikið, at stjórin á tí almenna koddanum ikki kunnar limir sínar um ymiskt annað. Hann kundi t.d. kunna lesararnar um gongdina í Senigal. Hvussu hann, bankarnir og nakrir privatir settu eitt felag á stovn, har tað almenna sum eitt eiti slapp at vera við. Slapp at eiga ein evarska lítlan part av felagnum. Men so gekk galið. Nú vildi hvørki stjórin á tí almenna koddanum, bankarnir ella hinir privatu standa við endan. Rokningin varð send til landskassan. Til Føroya Landsstýri og Løgtingsins Fíggjarnevnd.

HANN kundi eisini greitt frá, hvussu nógvar reklamatiónir eru komnar uppá føroyskan fiskaútflutning seinastu árini, og hvussu nógv Føroya Fiskasøla hevur gjørt fyri at kanna hesar reklamatiónir. Og hvussu nógv hava hesar reklamatiónir kostað føroyska fiskimanninum, føroyska fiskiídnaðinum og ikki minst tí almenna? Stjórin á tí almenna koddanum sendir jú bara rokningina til landskassan. Tað vil siga, at Per, Pól og Palleba rinda gildið hjá stjóranum á tí almenna koddanum.

ALT hetta er helst tílíkt, sum bara er okkara millum í tí innara lítla skaranum.

vj.

Trúvirði

Tað er ikki lukkuligt, sum fyrrverandi stjórnarblað við fyrrverandi leiminni á odda hevur leikað í sídani stjórnarskiftið fór fram í januar.

Tað er sjálvsagt ikki hugaligt hjá eini stjórn at verða avdukað, sum fyrrverandi landsstýri varð tað, ta Føroya fólk eftir valið vaknað við kaldan dreym og fann út av, at uttanlandsskuldin var tvær milliardir kr. stórri enn sagt varð frá áðrenn valið, at landsstyrið hevði latið rokningina bæði til effektiv vedhald og aðrar beinleiðis gjaldingar, eins og skip stoðu; gerð við landskassavedhaldi og uttan fíggjing, eins og ein bradur endi varð á eini rugvu av vinnuligum, almennum arvitisprojektum til nógvar hundraðtals millionir.

Stutt sagt, farið var so illa um, at eitt trotalbugv, sum eingin nakran tíð hevur sæð makan til og vónandi er heldur nakarntíð kemur at síggja, varð latið nyggja landsstyrinum upp í hendi og hetta, hoast vist hevur verið á eina skeiva gongd frá nógvum sjónum í nógv ár.

Tann gamla ramsan um at uttflutningur okkara bert verður fremdur til halvan pris, verður endurtikin upp í saman av fyrrverandi stjórnarblaði eins og av fyrrverandi leiminni. Her trota ikki osaman hangandi pástandir í leysari luft og uttan prógv.

Sosialurin 5. oktober og 7. oktober eru einki undantak í so mata. Har verða nevnd tal fyri útflyti, svinn, nøgdir og prísir, sum einki sum helst samband hava við veruleikan, og ti er eitt aftursvar ella orðaskiftt uttan meining.

Bankarnir verða skuldsettir fyri at hava gjørt onmiligar burturlegg. Ingar til nógvar hundraðtals millionir (sí sosialurin nr. 54 13 mai 1989 og nr. 55 18. mai 1989); eins og bankarnir skulu hava tikið imoti bankakhokum upp á 1,3 milliardir (sí fyrrverandi stjórnarblað 30 september 1989); "valevst sum trygd fyri nyggjari lanteku í føroyska bankunum, har urslitið fyri viðkomandi lántakara kann gerast ó ella tíð og einki til skattingar". Hetta er hópsleys og ábyrgdarleys skriving, sum einki hevur við veruleikan at gera, og ti er eisini í hesum feri orðaskiftið uttan meining.

Alogini á eitandi landsstyri: eins og alopini á bankar, vinnuliva sum heild, har orðið "eiðari" er gjørt til ringasta ókvæmsorðið í føroyska málinum; eins og alopini á SEV, heilsuliv v.m. fyri at hava ábyrgdina av øllum, sum er miseydnað eins og 96,5% av uttanlandsskuld føroyinga. (sí fyrrverandi stjórnarblað 31. august 1989); hava onki mark og eru ti einkymlandi.

Tað verður ikki nevnt, at landsstyri hevur goðkent hvørt eitt einasta kredittfelagslán, sum hava gjørt sitt til at uppfita buskapin solendis, at skattur og tollur hava fossað inn í landskassan og sprongt fíggjarlivina ígjegnum nógv ár. Landsstyrinum hevur ikki tørvað beinleiðis uttanlandslán. Ábir hava lagt nøvn til eina, mest til skipakeyp og vinnufíggjan. Fyrrverandi landsstyrið hevur nytt tollir og skattapeng ørnar til arvitisprojektir bæði á landi og sjógvi. Teir hava ikki bert nytt stóran part av fíggjarlivinum, men eisini yvirskoðið og nógv aftursat. Tí er so vorðið, sum er!!!

Nøtaramir hava verið vit oll. Vit hava havt ur at gera, fingið lein hvønn dag og lítlan toll og skatt. Vit hava livað í einum rúsi og nokrir livið. Einki er tí meira sjálvsagt enn, at nu mugu vit eisini gjalda rokningina. Hvar skuldi annars gjørt tað? Tey flestu av okkum hava hoast alt vitað, at hon fór at koma ein penan dag.

Tað sær út sum, um fyrrverandi stjórnarblað vil teina leiminni á odda vil grugga málsetningin hja núverandi landsstyri og lenda fólkahugsanina yvir á bankarnir, fiskasøluna, reiðarar, handlamenn, SEV v.m. og skuldsetta hesar fyri at verða teir stóru samfelagssyndararnir.

Hesir "samfelagssyndarar" arbeiða eftir einum málsetningi, sum av eini ella aðrari orsøk ikki hevur fyrrverandi leiminni, men urslitið er, hoast alt, at stór virðing er uttanlands fyri tí føroyska fiskimannínum, fiskaranum, teimum føroyska pensingastovnunum og fiskasølunni; men henda virðing er ikki til, ta id tað snýr seg um fyrrverandi landsstyrið, sum einsamalt ikki hevði verið gott fyri einari kronu í uttanlandsskuld.

Hetta er tað, sum núverandi stjórn roynir at rætta.

Samanumtikið: Trúvirði okkara stendur uppá spæl. Gjørt er gjørt, farið er farið. Tann føroyska vinnan og føroyingurin kunnu ikki liva við hesum. Tí má broyting koma í.

ROK

Latið Føroya Arbeiðsgevarafelag málið

Tíðindaskriv frá Flogfelag Føroya

Í sambandi við lýsta verkfallið móti Flogfelag Føroya, ið umfatar arbeiðsfólk á Hotel Vágar, Støðuplássunum á Flogvøllinum, Cafeteria á Flogvøllinum, Kioskini á Flogvøllinum, verða tit vinarligast bidnir um at seta hetta skriv í blaðið:

Í oktober 1988 varð gjørdur sáttmáli millum Sørvágs Arbeiðarafelag og Flogfelag Føroya, fyri nevndu starvsfólk, og metti Sørvágs Arbeiðarafelag tá sáttmálan so góðan fyri limirnar, at teir skutu upp at hann varð galdandi í 2½ ár, t.v.s. fram til 01. mei 1991, Flogfelag Føroya metti, at best var at fylgja tíðarskeiðinum fyri høvuðssáttmálan t.v.s. fram til 01. mei 1989.

Flogfelag Føroya segði sáttmálan upp til at fara úr gildi 01. mei 1989, orsøkin til hetta var ónøgd við, at limirnir úr hinum bygdunum máttu gjalda limagjald til Sørvágs Arbeiðarafelag.

Síðan varð heitt á Sørvágs Arbeiðarafelag um at taka upp samráðingar hesum viðvíkjandi, svarið varð, at teir skuldu venda aftur til hetta, tá høvuðssáttmálin millum FA og FAG varð samtyktur.

Fyrsti fundur millum partarnar varð settur 29. juni 1989, har arbeiðarafeløgini í Vágum saman við FA løgdu fram krøv síni. Flogfelag Føroya framførdi, at sáttmálin átti at halda fram óbroyttur, tó við teirri lønarhækkan, ið varð ásett í høvuðssáttmálanum millum FA og FAG.

Orsakað av summarfrí vóru partarnir samdir um at hava fund aftur 06. juli 1989 kl. 15.00, í hesum sambandi varð avtalað, at Flogfelag Føroya skuldi fáa eitt upplegg 30.06.1989 áðrenn middag. Hetta upplegg kom ikki hóast fleiri áheitanir, og 04. juli 1989 sendi Flogfelag Føroya tí telefax til sakføraran hjá arbeiðarafeløgunum, har sagt varð, at tíðin nú varð gingin undan, og at Flogfelagið roknaði við at venda aftur til spurningin aftaná summarfrítíðina.

Advokatvirkið svaraði 10. juli 1989, og bað um fund aftur 12. juli 1989 kl. 15.00, og hóast summarfrítíðina, varð henda áheitan gingin á møti, og fundur settur 12. juli 1989. Nýggjur fundur varð avtalaður til 01. aug. 1989.

Advokatvirkið sendir 02. aug. 1989 skriv, har greitt verður frá um fundin 12. juli, og biður um fund 03. august, hesin fundur varð hildin 07. august 1989. Aftaná henda fund vóru krøvini viðgjørd nágreiniliga, og nýggjur fundur settur 25. august 1989.

Advokatvirkið sendir 08. sept. 1989 skriv, har greitt verður frá fundinum 25. august 1989, og uppskot er um at hava fund í komandi vikuni, svar okkara er, at vit máttu hava longri tíð, orsøkin var, at samráðingarleiðarin var burturstaddur og ikki kundi møta meginpartin av september mánaði.

Næsti fundur varð settur 05. oktober 1989, har avtala varð gjørd um, at Flogfelag Føroya skuldi fáa nærri boð frá sakføraranum hjá arbeiðarafeløgunum áðrenn 20. oktober 1989.

Hesi boð komu 20. oktober 1989 kl. 14.20, og vóru í stuttum hesi:

Á stjórnarfundi í FA varð samtykt, at arbeiðarafeløgini **ikki** kundu góðtaka einans at fáa tær sømdir, Flogfelag Føroya kundi bjóða. Eisini varð sagt okkum, at um Flogfelag Føroya ikki í seinasta lagi 01. november kl. 12.00 gekk krøvum arbeiðarafelagana á møti, vórðu tiltøk sett í verk.

Í hesum sambandi verður gjørt vart við, at umframt 6,7% lønarhækkan á fyrsta fundi, hevur Flogfelag Føroya gingið meira enn helvtini av krøvunum á møti.

Seinasti fundur varð settur 25. oktober 1989 kl. 15.30, og á hesum fundi setti Flogfelag Føroya fram sáttmálauppskot, ið hildið varð í høvuðsheitunum at verða samsvarandi okkara fatan av teim mongu samráðingarfundum. Okkara metan er tó, at hetta uppskot átti at komið frá arbeiðarafeløgunum.

Tó gjørdu vit greitt, at vit ynsktu ein sáttmála fyri starvsfólk á støðuplássinum – og ein fyri Hotel Vágar, Cafeteria og Kiosk. Hetta okkara sáttmálauppskot varð vrakað kl. 18.25 og verkfall lýst, hetta varð longu lýst í Útvarp Føroya í sendingini kl. 18.30 sama kvøld.

Eftir okkara uppskoti hevði mánaðarlønin á støðuplássinum pr. 01. oktober 1989 verið kr. 15.001,25 og pr. 01. mei 1990 kr. 15.503,75, hetta svarar til eitt ískoyti uppá kr. 13,46 fyri hvønn arbeiðstíma eftir lønini 01. oktober 1989. Herafturat verður yvirtíð roknað um farið verður útum arbeiðsætlanina.

Viðv. Hotel Vágar, Cafeteria og Kiosk, er mánaðarlønin pr. 01. oktober 1989 kr. 12.799,28, hesi fólk arbeiða 40 tíma viku, við forskotnari arbeiðstíð.

Tá verkfall nú varð lýst, metti Flogfelag Føroya seg ikki kunna gera meira, men hevur latið málið til Føroya Arbeiðsgevarafelag.

Sørvágur tann 27. oktober 1989

Flogfelag Føroya

Mikkjal Simonsen
Hjørleif Joensen

Eysturoyar Javnaðarfelag

POLITSKUR FUNDUR

verður í
Kantinu Studentaskúlans
í dag, týsdagin, kl. 20.

Evni: Strukturbroytingar í fiskivinnuni.

Røðarar: John Smith, Atli P. Dam og Jørgen Thomsen.

Nevndin

Lýsið í **sosialinum**